VIÐMERKINGAR

# Nøkur orð um undirvísingarmiðlar

## - íkast til orðaskiftið um føroyskar skúlabøkur

TÍÐINDASKRIV

*frá Føroya Skúlabókagrunni*





**"Hvat hevur tú lært í skúlanum?"**
Tíbetur spyrja bæði foreldur og lærarar soleiðis hvønn dag, og tíbetur krevja tey flestu eitt nøktandi svar. Vit, sum fáast við at útvega undirvísingarmiðlar, eru komin til ta niðurstøðu, at tá ið námsfrøði, undirvísing og undirvísingarmiðlar eru á føroyskum og taka støði í tí heimi, sum næmingurin kennir, fær næmingurin mest burturúr - serliga í teimum yngru flokkunum.

Eisini úti í heimi er rákið tann næmingalagaða frálæran. Læribøkur, eisini roknibøkur - eitt nú í Danmark - taka fleiri og fleiri dømir og myndir inn í tekstin, sum donsk børn kenna júst frá sínum gerandisdegi. Tað er sjálvt námsfrøðiliga grundarlagið, sum verður lýst í t.d. formælunum í donsku bókunum, at næmingurin skal kunna identificera seg við tann heim, sum verður lýstur í støddfrøðibókunum. Tí er danskt, norskt, íslendskt o.a. undirvísingartilfar óviðkomandi í sínum upprunaformi í Føroyum.

Slík stevna er trupul at fremja í verki í Føroyum. Tí bæði heimliga umhvørvið eins væl og heimurin allur sum hann er, broytist alla tíðina, og tørvurin á dagførdum og nýggjum undirvísingartilfari er støðugt vaksandi, samstundis sum fíggjarligu játtanirnar til endamálið eru støðugt minkandi.

Tá ið Skúlabókagrunnurin í hesum føri velur at geva sítt íkast til eitt orðaskifti um føroyskt undirvísingartilfar, so er tað til tess at rætta ymsar misskiljingar, sum verða endurtiknar í orðaskiftinum, og til tess at upplýsa um ein part av tilfarinum, sum føroyskir lærarar og onnur hava skrivað. Tilfar, sum mong, eftir orðaskiftinum at døma, ikki vita um.

Endamálið er eisini at gera vart við, at Skúlabókagrunnurin veit um tørvin á nýggjum undirvísingarmiðlum, og at skipaðar útgávuætlanir eru og verða lagdar fyri t.d. nýggjum støddfrøðibókum, soleiðis at ein fullfíggjað og endurnýggjað støddfrøðisbókarøð til allan fólkaskúlan er tøk í 2009.

Fyrst til føroysku støddfrøðibókarøðina, Sigma/Skygni

Í 1987 varð farið undir at skriva føroyskar støddfrøðibøkur til allan fólkaskúlan. Tað eydnaðist við góðum lærarum og góðari fyriskipan at geva bøkurnar út ár um ár til 1995.

Meginreglan var, at so nógv rokning og støddfrøði sum møguligt skuldi taka støði í gerandisdegi barnanna, samstundis sum roynt varð at evna til ein hóskandi føroyskan málburð. Stórur dentur varð lagdur á, at støddfrøðibókarøðin skuldu lúka øll tey fakligu krøv, sum eru ásett av myndugleikunum.

**Dagførdar roknibøkur**
Í 1999 var øll útgávuheildin eftirmett á fundi við støddfrøðilærarar úr øllum landinum, og tóktist semja vera um, at tørvur var á broytingum og dagføringum. Síðani tá er grunnurin eftir skipaðari ætlan farin undir hetta arbeiði.

Til næmingarnar í fyrsta skúlaflokki eru undir felagsheitinum "Vit rokna" komnar út "Talbók", "Plussbók" og "Minusbók". Eisini er telduforritið "At rokna" útkomið, og nevnast kann ískoytistilfarið "Stuttlig pluss-tøl" og "Stuttlig minus-tøl". Í 2003 og í 2004 eru Skygni-bøkurnar til 8. og 9. skúlaflokk komnar út í spildurnýggjum líki, og ætlanin er, at øll støddfrøðibókarøðin skal verða endurnýggjað innan tey næstu 5 árini.

**Fakliga í ordan**
Eftir at hava samanborið føroysku Sigma/Skygnibøkurnar við ein heilan hóp av donskum og útlendskum støddfrøði-systemum, er Skúlabókagrunnurin komin til ta niðurstøðu, at við teimum endurnýggingum, sum eru farnar fram og framhaldandi fara fram, lýkur bókarøðin tey fakligu krøvini til støddfrøðifrálæru í føroyska fólkaskúlanum. Harafturat viðger bókarøðin ein hóp av serføroyskum fyribrigdum so sum grindabýti, fiskivinnu, alivinnu, ítrótt og mentan, eins og bókarøðin viðger viðurskifti í Hetlandi, Íslandi, Noregi, Danmark o.s.fr.

Hvørjar læribókarøðir hin einstaki lærarin velur at brúka, fer grunnurin ikki at leggja seg útí, tað er ein avgerð sum skúli, lærari og foreldur eiga at taka í felag. Eitt frælsi, sum eisini Skúlabókagrunnurin metir sera høgt, og sum eigur at verða varðveitt.

**Og so til landalæruna**
Í grein í Dimmalættting tann 11. september 2004 viðger Randi Jacobsen, tíðindakvinna, føroyskt undirvísingartilfar undir heitinum "Gamalt føroyskt fram um danskt". Í ljósinum av tí, sum er sagt frammanfyri, kundi yvirskriftin eisini verið "Gamalt føroyskt fram um óviðkomandi danskt".

Í nevndu grein verður eisini annað undir-vísingartilfar viðgjørt. Har stendur: "Tað eru ikki bara bøkurnar í støddfrøði, sum eru so gamlar. Nýggjasta føroyska landalæran er frá 60-árunum, og heimurin og heimsins lond síggja ikki líka út í dag."

Vit hoyra mangan hesa mýtuna - henda pástandin, at einki føroyskt tilfar er til, og at tað sum er, er so gamalt. Men í hesum føri er tað ikki rætt. Tað er ein hópur av góðum og viðkomandi tilfari gjørt til lærigreinarnar landalæra og náttúru og tøkni, og landalærubøkurnar frá 60unum, sum sipað verður til, eru ikki longur til sølu.

**Nógvar landalærubøkur**
Í 1997 varð nýggj lærigrein skipað, sum eitur "Náttúra og tøkni" frá 4. til 6. flokk. Henda lærigrein fevnir um tað, sum vit vanliga kenna sum landalæra, lívfrøði og alis/evnafrøði. Í 1999 kom út "Náttúra og tøkni 1, grundbók, arbeiðsbók og amboðskassi", og í 2001 "Náttúra og tøkni 2". Ikki fyrr enn í 7. flokki verður landalæra sjálvstøðug lærigrein.

Umframt átta arbeiðshefti við høvuðsheitinum "Heimurin", og sum eru samskipað við føroyska "Heimsatlasið", er eisini yvirlitsverkið "Heimurin í hagtølum og evnum". Harumframt eru ellivu arbeiðshefti til "Árbók fyri Føroyar", hagtalsbók, sum verður givin út á hvørjum ári í samstarvi við Hagstovu Føroya. Landalærualfrøðin "Heimsins lond" hóskar væl sum kunnandi yvirlitsverk í fólkaskúlanum. Nevnast kunnu eisini sjónbondini "Vit í Norðurlondum". Til framhaldsdeild fólkaskúlans eru ætlaðar tær báðar týddu temabøkurnar "Náttúra og umhvørvi" og "Mentan og umhvørvi", báðar við føroyskum arbeiðsheftum.

Enn er at nevna tað grundleggjandi bókaverkið "Føroya jarðfrøði" eftir Jóannes Rasmussen, sum er skipað soleiðis, at bókin er nýtilig í undirvísing á ymiskum aldursstigum. Filmurin "Upphav Føroya 1-3", sum Jóannes Rasmussen gjørdi saman við sjónvarpinum, er hentur at brúka saman við bókini. Samprentsbøkurnar "Rúmdin", "Jørðin" og yvirlitsbókin "Grót og steinar" eru eisini hentar í landalærufrálæruni. Saman við Bókadeild Føroya Lærarafelags gav Grunnurin í 2003 út "Veður og tíðindi í Føroyum 1875-2002", og er ætlanin at gera arbeiðsuppgávur við støði í hesari bókini.

Í nýggju lesiætlanini verður tað lagt upp til, at næmingarnir sjálvir, í samstarvi við læraran, úr ymsum keldum læra at finna sær relevant tilfar. Hetta er ein partur av menningini av næmingunum.

**Viðkomandi undirvísingartilfar**
Lat tað við hesum orðum vera nóg mikið á hesum sinni. Ætlanin var í stuttum at beina burtur ávísar misskiljingar, eins og ætlanin var at vísa á týdningin av, at undirvísingarmiðlar grunsins eru viðkomandi, taka støði í tí heimi, sum børnini kenna, og at málið er føroyskt, móðurmálið hjá børnunum. Viðkomandi lærdómur er grundarlag undir allari menning og búning hjá børnum. Óviðkomandi lærdómur verður í besta føri gloymdur og í ringasta føri ein forðing í samstarvinum millum lærarar og næmingar.

Er tað onkur, sum hevur hug at kunna seg meira um ta undirvísingartilfar, sum Føroya Skúlabókagrunnur gevur úr, so ber til at leita inn á heimasíðu okkara www.fsg.fo.

**Alexendur Jespersen,**
formaður í Skúlabókanevndini
**Helena Dam á Neystabø,**
leiðari á Føroya Skúlabókagrunni

*Framhald av síðu 11*

felagsligum rættvísi. Hetta merkist serliga, tá ið ein tulkaður sannleiki um Guds orð nú aktivt verður brúktur sum argument fyri at diskriminera tey samkyndu.

Ræðumyndirnar nú, tá ið orðaskifti um tey samkyndu gongur, eru nógvar. Kirkjan er um at syndrast, menniskjan er um at fara fyri bakka, samfelag og heimur eru á veg í avgrundina o.s.fr. Men fá ella eingi vísa á HVÍ soleiðis er. Hvat er til dømis vandin við, at samkynd kunnu kunnu liva í skrásettum parlagi? Fer Gud at fordøma samfelagið fyri tað? Er nakar vandi fyri at homoseksualitetur fer at breiða seg sum ein farsótt ? Verður tað ein fylgja, at menniskjan ikki megnar at reprodusera seg? Er homoseksualitetur ikki heldur eitt avbrigdi í einari náttúru, sum annars millum dýr og millum menniskju er eyðmerkt av so ófatiliga nógvum variatiónum?

Føroyar eru eitt lítið samfelag við nógvum sosialum eftirliti. Í mun til onnur lond hevur føroyska samfelagið verið fyri lutfalsliga avmarkaðum mentunarligum fjølbroytni. Illa er t.d. statt við kvinnuumboðan, har avgerðir verða tiknar - nakað, sum umframt aðrar orsøkir, eisini møguliga er eitt úrslit av okkara kristnu lívsáskoðan. Tað er soleiðis at undrast á, at fólk enn í dag í brúdleypum uttan at blunka kvøða ramliga við um, hvussu kvinnan sambært teim heilagu skriftum skal vera manninum undirgivin.

Moralsk dogmatisma hevur tíverri fínar umstøður her heima. Siðaliga eftiransingin, sum er partur av almenninginum og okkara institutiónum, ger sítt fyri at handhevja siðbundnar moralskar lógir uttan eyga fyri teimum syrgiligu, sosialu fylgjum, hetta dagliga fær. Tey samkyndu líða heilt víst undir hesum. Tey flestu mugu krógva burtur tann týðandi part av sínum kenslum, sum kynslívið ber í sær, tí teimum skal ikki verða loyvt at liva soleiðis, sum tey eru skapt til. Tey fáu samkyndu, sum frælst og opið tora at liva við sínum íborna seksualiteti, hava tað ikki lætt. Hetta eru alt menniskju, ið mugu fornokta seg sjálvan, og tá ber illa til at vera eydnuríkur. Betur verður tað ikki, tá ið sjálvkravd umboð fyri tann "einasta bíbilska sannleikan" lýsa homoseksualitet sum eina sjúku, ið tey vilja reka burtur eins og óreinar andar.

Fakta er, at homoseksualitetur hevur altíð verið ein partur av fólkamentanum kring í heiminum. Hann var soleiðis útbreiddur í grikska samfelagnum, sum hugsjónarliga gjørdist støði undir romversku mentanini, har eisini kristindómurin fekk sítt skap. Nógv gott ( politiskt, listarligt, skipanarligt o.s.fr.) rann av hesari frælsu mentan, sum er grundarsteinurin undir tí framkomna vesturheimi, vit eru ein partur av.

Persónliga havi eg vinfólk uttanlands, ið eru opið samkynd. Hetta eru sera framkomin og tolerant menniskju, sum liva í skrásettum parlagi. Í teirra sínámillum samlívi og teirra viðurskiftum við onnur er seksualiteturin ikki nakar trupulleiki. Tað, sum telur er, at menniskju eru eydnurík og í tráð við seg sjálvan í tann mun, tað ber til. Fortreytin fyri hesum er eitt frílynt samfelag, har menniskju uttan at verða sett til dóms av øðrum kunnu liva saman og skipa sær sína tilveru sambært teimum tilelvingum og eginleikum, sum Skaparin hevur lagt í tey.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Jákup í Lopra sjeytifimm



Í dag, 21. september, fyllir Jákup Joensen - eisini kendur sum Jákup í Lopra, 75 ár.

Jákup er kendur vinnulívsmaður, hevur havt fleiri skip eins og hann eisini hevur verið í gistingarhúsvinnuni, tá hann keypti Hotel Føroyar í Havn, sum tá æt Hotel Borg.

Jákup Joensen er ættaður úr Sumba. Hann er sonur Paulu S og Poul S. Joensen.

Hann tók studentsprógv í 1950, skiparaprógv í 1953, stýrimansprógv í 1965 og skipsføraraprógv í 1956. Hann sat í bygdarráðnum í Sumba í nøkur ár, og í 1994 varð hann valdur á ting fyri Sambandsflokkin í Suðuroyar valdømi - har sat hann til valið í 1998.

## Tøkk

Hjartaliga tøkk fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi tá ið kæra systir, móðir, vermóðir, omma og langomma okkara

**Simona Mohr**
**Vági**

andaðist og varð jarðað. Tøkk, øll tit, ið lótu blómur og kransar og góvu Eldrasambýlinum peningagávur. Serstakar tøkkir verða bornar Ólavi Rasmussen, presti, fyri góða og hjartanemandi gravtalu, og heimahjálpum, heimasjúkrasystrum og sjúkrahússtarvsfólkum, ið lættu um, meðan sjúka nívdi Simonu. Tykkum mongu, ið fylgdu hesi ediligu kvinnu til seinasta hvíldarstaðin og hjálptu okkum so væl í sambandi við ervið, heilsa og takka vit eisini.

*Vegna øll tey avvarðandi*

**Jákup, Jóannes og Leivur**

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at góði maður, pápi, svigarpápi, abbi og langabbi okkara

**Arnold Davidsen**
**Toftir**

andaðist fríggjadagin 17. september, 84 ára gamal.

Jarðarferðin verður í dag, 21. september, kl. 14.00 úr Fríðrikskirkjuni

*Vegna tey avvarðandi*

**Henny**
**Aloma, Hanus, Niclas, Annika, Harda og Fróði**

Tey sum vilja minnast Arnhold, kunnu lata eina peningagávu til Fríðrikskirkjuna, konto í peningastovnunum.

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at

**Símun Karl Mikkelsen**
**Úti í Grønlandi,**
**Tórshavn**

andaðist í heiminum 17. september, 78 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr kirkjugarðskapellinum týsdagin 21. september kl. 13.00.

*Fyri tey avvarðandi*

**Lillan, Kathrina, Carl Johan og Hans Marius**

†

Kunngjørt verður, at okkara kæra mamma, omma, langomma og systir

**Bjørghild Jørgensen**
**fødd Poulsen**
**úr Havn**

andaðist á Landssjúkrahúsinum fríggjadagin 17. september, 76 ára gomul.

Farið verður úr Landssjúkrahúskapellinum týsdagin 21. september kl. 18.00.

Jarðarferðin verður úr Kirkjugarðskapellinum mikudagin 22. september kl. 13.00.

*Vegna tey avvarðandi*

**Erling, Randi og Edna**



*Neisti er AWANA-maskotturin, sum kemur á vitjan av og á*

# So byrjar AWANA aftur …

**Mikudagin 22. sept. kl. 17.30 byrjar AWANA aftur í Ebenezer í Havn. AWANA er barna- og ungdómsarbeiði, og er hetta triðja árið, at tað er í Føroyum**

TÍÐINDASKRIV

Byrjað var fyri tveimum árum síðani við gentum og dreingjum úr fyrsta og øðrum flokki. Í fjør kom so triði flokkur aftrat, og í ár kemur so eisini fjórði flokkur við.

Endamálið við AWANA er at náa børnini við evangeliinum um Jesus Kristus, og at læra tey at tæna Honum. Hetta verður gjørt við sangi, bíbliusøgum og spæli.

Børn úr fyrsta til fjórða flokk verða kallaði Neistar. Hesi verða so býtt í bólkar, kallaðir Tøtlarar, Reikarar og Klintrarar, og til hvønn av hesum bólkum er ein arbeiðsbók. Við at loysa uppgávur úr arbeiðsbókini og læra seg brot og skriftstøð úr Bíbliuni uttanat fáa tey ymisk heiðurmerki, krúnur og gimsteinar, sum tey kunnu seta á sína AWANA troyggju.

AWANA undirvísingartilfarið er grundað á skriftirnar, og í teimum trimum bókunum verða grundleggjandi sannleikar um Gud, Jesus Kristus, frelsuna og Bíbliuna lærdir. Stórur dentur verður lagdur á at minnast skriftstøð, og hesi trý árini fara børnini at læra og endurtaka meira enn 60 skriftstøð úr Bíbliuni.

AWANA byrjaði í USA í 1950, og í dag finst arbeiðið í 110 londum runt allan heimin. Orðið AWANA kemur úr fyrstu bókstøvunum úr ensku orðingini: Approved Workmen Are Not Ashamed, sum er tikið burturúr 2. Timoteusarbrævi 2,15.

Á fundum í Neistaklubbanum sameina vit tað at læra og at hava tað stuttligt.

Ein AWANA fundur varar í hálvanannan tíma og er býttur í tríggjar partar.

Fyrstu løtuna verður sungið og sagt verður frá søgum og hendingum úr Bíbliuni, og lært verður um kristin lívsvirði.

Síðani verður arbeitt í smærri bólkum við at læra seg skriftstøð og loysa uppgávur.

Tann síðsta hálva tíman verða børnini býtt í bólkar og spæla tey serligu AWANA spølini. Áðrenn farið verður til hús verða heiðursmerkini býtt út.

Neisti er AWANA-maskotturin, sum kemur á vitjan av og á .

Øll børn úr fyrsta til fjórða flokk eru hjartaliga vælkomin til AWANA í

Ebenezer mikudagar kl. 17.30.

## Dagurin

**21. september. Matteus**. Ápostulin og evangelisturin Matteus. Halgisøgan veit at siga, at tá ið ápostlarnir skiltust, fór Matteus til Etiopiu og boðaði evangeliið har. Er helst ein av teimum, sum á kirkjubøstólunum er avmyndaður við bók í hendi. Kongurin í Etiopiu læt hann taka av døgum.

Bíbilska navnið merkir *Guðs gáva.*